TELDUSÍÐAN

Matur á la telda...

Husets Kogebog er ein nýggj donsk kókibók, sum fæst á telduføgu

TEKSTMASKINAN

Tað hevur altíð verið gott látin ikki at seta kaffikoppin á telduborðið ella eta kakur yvri nertlaborðinum. Molarnir gera ónáðir, koma teir millum nertlarnar.

Hinvegin teldan um at verða nútímans ísinkrammi í køkinum. Nýggjar kókibøkur koma javnan á internetið ella á telduføgu og tann elektroniska útgávan hevur eisini týðandi fyrimunir fram um prentaðu útgávuna.

Vín til matin

Husets Kogebog er tann einasta kókibókin á telduføgu á donskum. Og har stendur meira, enn bert uppskrivtir. Umframt teir 860 rættirnar við myndum, er eisini eitt vínleksikon í Husets Kogebog. Vínið er væl lýst við smakki og hvussu tað sær út og hvaðani tað kemur. Við allar tær viðkomandi uppskrivtirnar eru eisini uppskot til eitt ella fleiri vín, ið hóska til matin.

Matur og multimedia

Ein vøruskrá er eisini á telduføguni við sløkum 300 vanligum vørum. Her fæst ikki meira at vita, enn tað, sum stendur á vøruetikettunum, so avmarkað er, hvør nytta fæst burtur úr hesum hentleikanum.

Mestu nyttuna fært tú kortini burtur úr teimum 22 sjónvarpskutunum, sum forritið hevur í sær. Her sært tú, hoyrir tú og her kanst tú lesa, hvussu tú eitt nú sker út høsnakjøt ella gert ein góðan fiskarætt. Tekstirnir eru góðir við mongum upplýsingum, meðan sjónvarpskutini eru heldur stutt og ov ógreitt eru, hvussu tey skulu nýtast. Og so lukta tey ov nógv av handilsreklamu: Ein fiskarættur er skjótur og lættur at gera til eina festliga løtu og dunnubrinka kann dampast, steikjast ella gerast til frálíkt fars, ja, ja...


Uppskrivtirnar kunnu prentast út, so tær kunnu nýtast sum innkeypslist, og so sleppur tú undan at skula renna aftur og fram millum telduna og kjøtgrýturnar. Tí í køkinum eigur teldan ikki at vera! Mjøl og dampur eru reint gift fyri káplar o.l.

Tað besta við Husets Kogebog eru møguleikarnir at leita eftir ingrediensum í einum rætti. Til ber at leita eftir rættum, sum hava í sær upp til tríggjar ávísar ingrediensir. Hetta er sera praktiskt, um tú vilt eta okkurt við gularøtum og purru, men ikki hevur hug at gera tað, tú plagar. Tað er eisini smart, um tú hevur okkurt liggjandi í køliskápinum, sum skal etast, men sum tú ikki júst nú, hvussu tú skalt nýta.

Tríggjar kokkahúgvur

Husest Kogebog er ein útmerkað elektronisk kókibók. Hon nýtir til fulnar møguleikarnar í miðlinum, men manglar eitt sindur í designi og funktiónaliteti. Ov lítið er gjørt burtur úr designinum og ov trupult er at fáa skil á teimum mongu uppskrivtunum. Men tað er danskt og bíligt. Út av seks møguligum fær forritið tríggjar kokkahúgvur...

Husets Kogebog koyrir undir Windows 3.1 og 95 og setur smá systemkrøv um tú ikki eisini vilt síggja sjónvarpskutini.



Telduføgan Husets Kogebog er ein frálík elektrónisk kókibók. Myndir eru eisini, sum sýnar, hvussu lagt verður til rættis

Video á Netinum

RealVideo er navnið á nýggjari tøkni frá firmanum RealAudio, sum annars hevur spesialiserað seg í at senda ljóð á Internetinum. RealVideo sendur sjálvandi livandi myndi út. Tað verður gjørt á ein serligan hátt, soleiðis at tú sært fyrstu myndirnar áðrenn allur filurin er heintaður inn í telduna.

So nýtist tær ikki at bíða so leingi eftir downloadingini. Um linjan er ov sein ella full, kann forritið bara lata vera við at taka nakrar myndir og á tann hátt fáa tingini at flóta kortini. RealVideo kann heintast frá RealAudio á adressinum http://www.realaudio.com

Betri LCD-skíggjar

LSD-skíggjarnir eru tað vánaligsta slagi av fløtum skíggjum til berbarar teldur.

Nú hava Chips & Technologies annars ment eitt nýtt slag, sum ger myndina nógv betri og sum gera LSD-skíggjarnar til bíligari konkurrentar til TFT-skíggjarnar

Super MacBerbar

Apple hevur stórar trupulleikar, men teir tarna kortini ikki teimum í at vísa fram nýggja notebooktelduna: PowerBook 3400 eitur hon, og serliga er t leggja til merkis, at hon hevur ein PowerPC prosessor upp á ikki minni enn 240 MHz, sum skuldi givið nakað tað sama sum ein 300 MHz Pentium prosessor kann geva. Maskinan hevur sjálvandi eisini State-of-the-art útgerð á øllum øðrum økjum, so sum 3 GB harðdisk, innbygt Ethernet, 12x-speed CD-rom o. s. fr.

Prísurin er sjálvandi eisini í serflokki, millum 35.000 og 60.000 krónur..



Í kókibókini ber eisini til at síggja, hvat slag av víni hóskar væl til matin, og til ber eisini at leita eftir eini uppskrivt, har tú t. d. skal nýta purrur, gularøtur og eitthvørt annað

Anti-Virus

McAfee - heimsins stórsti framleiðari av antivirusforritum, hevur júst røttu og bestu forritini til at verja tygara dáta móti skaðiligum telduvirusum.

VIRUSSCAN™ - Finnur og burturbeinir kend og nýggj telduvirus á disklum, fløgum, harðdiskum og líknandi dátagoymslum. VirusScan fæst til DOS, Windows, OS/2, Machintosh og UNIX.

WEBSCAN™ - Kannar forrit og dáta, ið verða móttikin um internetið. WebScan virkar saman við NetScape, MS-Explorer og fleiri øðrum internet forritum.

NETSHIELD™ - Verður lagt á net-servaran og kannar øll dáta og forrit, ið verða goymd ella lisin á servaranum. NetShield fæst til Novell NetWare og Windows NT-server

WEBSHIELD™ - Ein sokallaður "Firewall", ið verjir Web-servaran móti telduvirusum

BOOTSHIELD™ - Verjir móti bootvirusum við at kanna bootsectorin tá teldan startar.

ROMSHIELD™ - Er ein bootprommur, ið verður settur á netkortið. RomShield kannar bootsectorin fyri telduvirus áðrenn stýriskipanin verður innlisin.

McAFEE

690 Oyndarfjørður, tlf. 44872
fax. 44873, e-post: mcafee@olivant.fo